# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Esmar Jacobsen 80 ár

Fríggjadagin 9. desember verður Esmar Jacobsen, fyrrverandi trúboðari, 80 ár.

Esmar er ættaður og uppvaksin í Norðragøtu. Hann er nummar 4 av 13 systkjum, harav 11 teirra eru á lívi. Foreldrini vóru Eliesar Jacobsen í Tjørnustovu og Sunnuva f. Heinesen í Súnastovu.



Esmar gekk sjey ár í barnaskúla. Sum 16 ára gamal flutti hann til Havnar og fór í prentaralæru á Dimmalætting og var útlærdur hondsetari í 1946. Í 1947 gavst hann á Dimmalætting og fór til Bókaprent, har hann lærdi maskinseting, og har setti hann sjálvur fjórði Bíbliuna í týðing Victor Danielsens. Ungdómsárini í Havn búði hann á KFUK, og í frítíðini var hann nógv í Gundadali. Hann spældi á høgra vongi á 1. liðnum hjá HB frá 1945 til 1949. Hann var við á býliðnum og var eisini úttikin sum eykamaður á landsliðið, sum spældi móti hetlendingum í 1948.

Í 1949 fór hann til Keypmannahavnar á fakskúla og meistaraskúla innan prentarayrkið, og starvaðist har í tvey ár. Hann kom heim aftur í 1951 og starvaðist eitt skifti í Prentsmiðjuni í Bókahandlinum. Sama árið var Prentarafelagið stovnað og Esmar var formaður fyrstu árini.

Í 1952 giftist Esmar við Maud, sum er ættað úr Kollafirði, dóttir Sámal Andrias Djurhuus, Framman fyri Garða, og Thomassinu f. Thomsen, á Tanganum. Tey búsettust úti í Grønlandi í Havn, har Esmar saman við beiggjunum, Magnus og Absalon, bygdu stór hús við trimum íbúðum. At húsini vóru í 4 hæddum og at beiggjarnir vóru úr Gøtu var orsøkin til, at húsið millum manna varð kallað Gøtuborg. Næstu árini arbeiddi Esmar á prentsmiðjuni hjá 14. September, sum helt til í húsunum hjá Erlendi Patursssyni úti í Hornabø. Hetta var eitt spennandi men strævið arbeiði, tí at tíðirnar vóru ringar, og nógvur ófriður var á politiska pallinum og á arbeiðsmarknaðinum.

Hann gavst fyribils sum prentari, tá ið hann fór á bíbliuskúla í Hillerød í 1958. Valið, at fara á bíbliuskúla, grundaði hann á eitt innara kall um at gerast trúboðari.

Árið eftir fór hann á trúboðaraskúla í Oslo, og var útlærdur í 1960. Næstu 5 árini var hann í parttíðartænastu hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum, og í hesum tíðarskeiði arbeiddi hann á »Einars Prent« hjá Einari Joensen, sum vísti honum vælvild, tá hann skuldi frá arbeiði í trúboðaraørindum.

Esmar gavst við prentarayrkinum í 1965, tá ið hann gjørdist trúboðari burturav. Sum trúboðari hevði hann reglulig møtir kring landið, og harumframt hevði hann vitjanartænastu hjá gomlum og sjúkum. Av tí sama var hann nógv at síggja á Landssjúkrahúsinum øll árini sum trúboðari, og hann vitjaði eisini á varðhaldinum eina ferð um vikuna í tilsamans 36 ár. Í 1962 kom hann upp í sjómansmissiónsarbeiði, og var sjómanstrúboðari 9 vertíðir í Vestmannaoyggjunum og eitt stutt skifti í Ravnoynni. Sum trúboðari virkaði hann øll árini út frá Havnini, og gjørdist hetta arbeiði lættari og meira umfatandi, tá ið Missiónshúsið við Landavegin, sum var bygt við sjálvbodnari arbeiðsmegi, varð liðugt í 1972, soleiðis at møtir, sunnudagsskúli, blaðarbeiði, forlagsarbeiði, týðingar o.a. kundi gerast á einum og sams tað.

Hann hevur fingist nógv við at skriva. Sum yrkjari, undir heitinum Esmar Jacobsen Gata, gav hann út savnið »Fiólin« í 1956 og í 1990 kom nýtt yrkingasavn við heitinum »Tema við frábrigdum«, sum var úrval úr fyrra savninum við nøkrum nýggjum yrkingum afturat, og beiggi hansara, Suni myndprýddi bæði yrkingasøvnini.

Sum trúboðari skrivaði hann 270 kristiligar hugleiðingar í 14. September og allar eru endurprentaðar í Sosialinum. 95 av hugleiðingum komu út í bókini »Sáðkorn«.

Hvat tí skrivliga viðvíkur hevur hann gjørt mest við at týða andaligar bøkur hjá C. O. Rocenius, Hugo Odeberg, Øivind Andersen, Erik Pontoppidan og Carl Fr. Wisløff. hesar týðingar vórðu av fyrstan tíð skrivaðar til Kirkjuligt Missiónsblað, sum hann stjórnaði sjálvurannar í umleið 30 ár.

Maud og Esmar búðu í Gøtuborg frá 1952-1988, tá ið tey avgjørdu at flyta og keyptu hús við Landavegin. Tey fingu 7 børn, harav 6 eru á lívi. Sámal Andrias, Eliesar, Súni og Ruth búgva í Havn, Thordis býr í Vestmanna og Erling býr í Keypmannahavn. Erling Marni, sum varð føddur í 1961, doyði bert nakrar dagar gamal. Esmar og Maud hava tríggjar abba- og ommudøtur og tær eru Maud, Gudrun og Siv.

Esmari verður ynskt hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum, sum hann heldur saman við sínum nærmastu á Tjarnargarði, har hann hevur búð síðsta árið.

## Andlát og jarðarferðir

**Christian Joensen**, ættaður úr Skopun, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 7. desembur, 79 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum sunnukvøldið kl. 18.00

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin kl. 13.00

**Karin Joensen** úr Fuglafirði, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mikudagin 7. desember, 100 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, sum vilja minnast Karina, kunnu lata Eysturoyar, Røktar- og Ellisheimi eina peningagávu.

**Anders Mosbjerg Christensen** í Vági andaðist 4. desember á Ellisheiminum á Tvøroyri, 78 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum hósdagin klokkan 17.30

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin klokkan 13.

Sungið verður úr sálmabókini.

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Karin Joensen**
úr Fuglafirði

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mikudagin 7. desember, 100 ára gomul.
Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Rigmor, Kaj Eli og Charles**

*Tey, sum vilja minnast Karina, kunnu geva eina peningagávu til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim.*

## Løgmaður vitjaði býráðið

**Mánadagin 5. des. var løgmaður Jóannes Eidesgaard við umsiting og vitjaði umsitingina hjá Tórshavnar kommunu**

VITJAN

Talan var um ein óformellan fund, men tó við dagsskrá, har tey vitjandi úr Tinganesi vórðu víst runt og m.a. sóu hvussu býráðsumsitingin arbeiðir.Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu Heðin Mortensen sigur, at umsitingin hjá løgmanni og Tórshavnar kommuna hava nógv felags áhugamál.

Nevnast kann býlingurin úti í Tinganesi og varðveiting av søguligum fornminnum í kommununi. Eisini í samband við almennar vitjanir er neyvt samstarv partanna millum, soleiðis at til ber at leggja ætlanir til rættis í góðari tíð.Hetta hevur ikki verið roynt áður, men vit halda at slíkir fundir eru av stórum týdningi, serliga nú fleiri almennar uppgávur verða lagdar út til kommunurnar at umsita, sum t.d. eldraøkið, har Tórshavnar kommuna kundi verðið nýtt sum royndarkommuna, sigur Heðin Mortensen.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum sýndu samkenslu, tá góða kona og mamma okkara

**Ann Larsen-Lechuga**

doyði og varð jarðað.

Ann var ættað av Tvøroyri og búsitandi í Valby.

Hjartans tøkk til øll, sum sendu blómur, kransar og heilsanir til jarðarferðina, og eisini til vinir og kenningar, sum stuðlaðu okkum og Ann undir torføru og drúgvu sjúkraleguni.

*Fyri børnini: Einar, Thor, Liv og Maj og fyri tey avvarðandi*
**José Lechuga**